# STOVNA NÝTT ALS FYRI FISKIMENN

**MINSTULØN** Nú skal ein grunnur stovnast fyri Fiskimenn, sum líkist ALS

Áki Bertholdsen

Hetta er tað, sum liggur í kortunum, nú nevndin, sum skal endurskoða minstulønina, er komin eitt sindur áleiðis við arbeiðnum.

Alfred Petersen, nevndarformaður, sigur, at nú manningarfeløgini sjálvi skuli betala minstulønina, er talan um at skipa ein grunn uttanfyri fíggjarlógina, sum líkist ALS við einum stjóra og einum stýri har vinnan hevur síni umboð.

Hinvegin liggur tað ikki í kortunum, at lata ALS umsita skipanina.

Hinvegin hevur landsstýrið boðað frá, at tað er sinnað at leggja eitt stovnsfæ í ein slíkan grunn fyri at fáa eina góða byrjan á.

Men hvussu manningarfeløgini skulu gjalda inn í grunnin, eru tey als ikki komin til enn.

Men tey kanna skipanirnar í Noregi, Íslandi og í Danmark, fyri at vita, um nakað haðani kann brúkast í eini føroyskari skipan.

Í Danmark er skipanin tann, at fiskimenn eru tryggjaðir eina minstuløn upp á 1000 krónur um dagin, men tað er ásett í sáttmálanum millum fakfelagið 3F og Reiðarafelagið.

Í Noregi er skipanin tann, at eitt avgjald upp á trý prosent verður lagt á avreiðingarvirðið, hvørja ferð eitt skip avreiður og tað fer so í grunnin.

Reiðarin betalir so fasta hýru, men dekkar avreiðingarvirðið ikki ta føstu hýruna, fær hann munin endurgoldnan úr grunninum.

Ein annar munur, er, at í Føroyum verður inntøkutrygdin roknað túr fyri túr. Men í Noregi verður tað roknað fyri hvønn ársfjórðing sær.

Minstalønin í Noregi er einar 58.000-59.000 norskar krónur fyri ársfjórðingin, so tað er ikki langt frá okkara minstuløn í Føroyum.

Summi, sum vit hava tosað við, hella mest til at brúka norsku skipanina sum fyrimynd fyri eini føroyskari skipan.

Men Alfred Petersen sigur, at tað ber als ikki til at siga nakað um hetta enn.

*aki@sosialurin.fo*



Limirnir í nevndini, sum skal gera eina nýggja minstulønarskipan, eru: Alfred Petersen, formaður, Tummas Magnussen úr Fiskimálaráðnum er skrivar og Vinberg Sørensen fyri reiðarar, Jan Højgaard fyri Fiskimannafelagið, Jóannes Martin Olsen fyri ráfiskaseljarafelagið, Auðunn Konráðsson er fyri Meginfelag Útróðrarmanna, Páll hansen er fyri Maskinmeistarafelagið og Eyðstein Djurhuus fyri Skipara- & Navigatørfelagið

# Gongur stútt og róliga framá

**INNTØKUTRYGD** Arbeiðið at lata inntøkutrygdina upp í hendurnar á manningarfeløgunum at gjalda og umsita, gongur væl. Men tað tekur sína tíð

Áki Bertholdsen

Arbeiðið at leggja inntøkutrygdina undir manningarfeløgini fíggja og umsita, gongur væl.

Tað sigur Alfred Petersen, løgfrøðingur, sum er formaður í nevndini, sum skal gera skipanina, sum manningarfeløgini skulu umsita.

Men nær arbeiðið verður liðugt, dugir hann ikki at siga.

Hinvegin er hann fullgreiður yvir, at ein loysn er ikki beint fyri framman.

- Hetta er ein 60 ára gomul skipan, sum skal kollveltast og tað ber ikki til at hurta málið ígjøgnum, sigur hann.

- Tað nyttar ikki at leggja trýst á og at áseta eitt evstamark, tí vit skulu finna eina skipan, sum allir partar kunnu liva við. Tað týdningarmesta er, at vit finna eina loysn, sum gongur politiska viljanum á møti og so hevur tað minni at siga um tað so verður í ár ella næsta ár, heldur hann.

Higartil hevur nevndin havt einar 10 fundir. Nevndin hevur arbeitt væl og hann væntar at finna semju, hóast Fiskimannafelagið fleiri ferðir hevur boðað frá, at tað vil ikki hoyra talan um eina skipan, at fiskimenn skulu betala minstuløn.

- Hinvegin er veruleikin tann, at tað er politiski viljin, at inntøkutrygdin skal av fíggjarlógini og undir manningarfeløgini at betala og tað mugu vit arbeiða útfrá.

*aki@sosialurin.fo*